DAGSINS MEINING

Tunlatíðir og hvat so!

Eitt tað mest skrivaða og brúkta orðið í føroysku miðlunum nú í longri tíð man vera tunnil. Vágatunnil, Norðoyartunnil, Øravíkartunnil og nú Gud hjálpimeg eisini Toftatunnil. Tað er líkasum komið inflatión í hetta við tunlum og er tað kanska ikki heilt óføroyskt heldur. Vit kenna tað so væl aftur úr søguni: tá ein skuldi fara í gongd við okkurt, so vildu fleiri aðrir sleppa at gera tað sama, tað verið seg innan vinnulív, handil "You name it".

Nýggjar tíðir – peningaliga og tøkniliga – hava við sær nýggjar avbjóðingar. Fyri bert fáum árum síðani var tað einki minni enn ørvitistos og ábygdarloysi at taka undirsjóvartunlar uppá tunguna. Og tá kreppan gjørdi um seg vóru vit føroyingar av donskum miðlum og politikarum skýrdir ørir og ábyrgdarleysir fyri at hava bygt teir mongu tunlarnar á landi. Í dag hevur pípan fingið annað ljóð. Nú verður kappast um at raðfesta tunlar, og seinasta skotið á stammuni er ein ella kanska tveir undirsjóvartunlar millum Eysturoynna og Streymoynna.

At hava visiónir og at brúka tøl til tess at rationalisera og effektivisera eitt samfelag úr enda í annan er væl ikki skeivt. Tað er náttúrligt. Tað verður sagt so oftani, at vit kunnu ikki steðga útviklinginum. Spurningurin er tó eisini, hvønn útvikling, menning vit ynskja. Henda vegin ella handa vegin. Hvussu vilja vit brúka skattapengarnar osfr.

Í dag eru flestu føroyingar fegnir um, at vit hava fingið Vágatunnilin. Hóast vit í løtuni ikki kenna allar tær positivu og negativu avleiðingarnar av hesum nærsagt unduri, so tykjast flestu okkara nøgd. Ikki minst tí tað er skjótari og lættari at koma til og frá flogvøllinum. Semja tykist eisini vera um tað skilagóða í at gera tunnil undir Lorvíksfjørð, og í Suðri eru tey á einum máli um, at ein tunnil má gerast aftrat har eisini.

So kemur Toftatunnilin. Tøl og útrokningar síggja bjørt og skilagóð út, tað verður skjótari og lættari at ferðast til og frá høvuðsstaðnum, og samfelagið sparir harvið orkuútreiðslur. So far so good sum tikið verður til. Men hvussu við tí økta trýstinum á høvuðsstaðin, sum ein av borgarunum í býnum, Hallur Hjalgrímsson so rætt nemur við í grein í bløðunum! Hvat verður gjørt fyri at forða fyri, at allir teir mongu tunlarnir ikki skapa uppaftur størri ferðslukaos í høvuðsstaðnum!

Hallur vísir skilagott og beinrakið á tað ómetaliga trýst, sum longu er á býin úr øllum ættum. Økta ferðslan setir proppar í alla staðni, havnarborgarar sleppa ikki í barnagarð, skúla og til arbeiðis rættstundis. Hvussu verður stætt fáa vit nú eisini undirsjóvartunnil millum størstu menningarplássini í landinum, høvuðsstaðarøkið og Eysturoynna. Vit mugu hava eitt breitt alment orðaskifti um hesar spurningar heldur Hallur og hesum kunnu vit taka fult undir við. Vit hava eisini á hesum stað sóknast eftir orðaskifti um trygd og ferðslumentan í kjalarvørrinum á undirsjóvartunlum. Men lítið røkist fyri, at ikki minst avvarandi myndugleikar vilja brúka orku til tað. So tað er sum tað plagar: tað skal also henda ein stór vanlukka, áðrenn tungan kemur á glið.

Tað kann sjálvandi eisini koma inflatión í orðaskifti, men kortini er tað ein av lunnunum undir menningini – har vit brúka royndir og sunna fornuft og miðvísa landsplanlegging til at seta út í kortið framtíðar útviklingin. Men tað kemur ikki altið av sær sjálvum. Tað góða – tað skilagóða – orðið er tað, sum skal føra okkum á mál – á tað skilabesta málið. Hervið taka vit Hall á orðið og bjóða okkara lesarum til at debatera ætlanina við tí nýggjasta tunnilsprojektinum. Eisini um teir møguleikar slíkt kann geva so sum at tung ferðsla kann leggjast uttan um Havnina og nakað av virkseminum kann flytast út um høvuðsstaðin. Gott orðaskifti. Og gott í teg, sum legði upp til tað.

Sosialurin

VIÐMERKINGAR

Sofus Olsen og Sannleikin

Kaj Leo Johannesen
Sambandsflokkurin

Lat meg byrja við at siga, at tað eru nakrar viðmerkingar ella pástandir sum ikki eiga, ella skulu verða svaraðir, men eg havi lisið nakað av tí, tygum hava skrivað fyrr, og havi eg altíð hildið tað verið væl undirbygt.

Undirritaði hevur kanska ein veikleika í so máta, at gerast eitt sindur keddur ella illur, tá undirritaði verður ákærdur at fara lætt um sannleikan, og at verða kallaður lygnari, tað haldi eg ikki, eg havi uppiborið frá nøkrum, og heldur ikki tygum. Mítt fremasta mál sum politikari hevur verið, er, og vil altíð verða, »sannleiki og rættvísi«.

Lat meg skera tað út í papp enn einaferð, hvat undirritaði segði í greinini, sum tygum heftu tygum við »Skotland er limur uttan at verða sjálvstoður« hettar haldi eg fast við at hettar er rætt, tí at eg veit, at soleiðis er tað.

Lat okkum so hyggja eftir, hvat tygum siga »Skotland hvørki er ella hevur nakrantíð verði sjálvstøðugur limur í ES.

Undirritaði hevur, sum vístur er á, ongantíð sagt at Skotland er sjálvstøðugur limur í ES, men harafturímóti segði undirritaði at. »Skotland er limur uttan at verða sjálvstøðugur«.

Síðani siga tygum í endanum á greinini, at hettar er ikki fyrstu ferð, at Kaj Leo Johannesen tvætlar í fjølmiðlunum, tað ger hann eisini, tá hann t.d roksaði um skotska mjólk.

Tað kann væl verða, at undirritaði tvætlar í fjølmiðlunum, tað kunnu onnur døma um, men um tygum kunnu grundgeva fyri, heilt konkret, hvat undirritaði tvætlaði um, tá talan er um mjólk, so kundi eg møguliga eisini rættað tær misskiljingarnar av vegnum, tí eisini við mjólkini veit undirritaði, at hann hevði rætt.

Víðari siga tygum, at skotska parlamentið er nærmast ein joke, nú kenni eg ikki skotska parlamentið innanifrá, tað hevur sum so heldur einki við meg at gera, men eg kenni tað skotska fólkið, tað er eitt tað stoltasta fólkið í heiminum, uttan at hava tíni kriteriu fyri sjálvstýri ella fullveldi.

Tygum kalla meg lygnara, tað er burturvið og ein umbering hevði verði upp á sítt pláss, men sum sagt, eg kenni tygum ikki, so eg fái ikki gjørt meira enn hesi fátæku orð.

Eg fari at enda við at ynskja tygum alt tað besta framyvir.

Jarnbardur til Scillyoyggjarnar?

Palli Jacobsen
Við ítróttarkvøðu

Er tað rætt, at lata Jarnbard umboða Føroyar á Scilliyoyggjunum í ár

Tá kappingin var av seinasta summar, var Jarnbardur við kvinnum besti bátur fyri summarið og harvið tann bátur, sum skuldi umboða Føroyar á Scillyoyggjunum.

Hesar megnar gentur høvdu gjørt tað bragd einaferð enn at vinna allar summarstevnurnar.

Tað er eitt ómetaliga stort bragd at gera hetta, og harvið burdu tað verið tær, sum verða sendar út í heim at umboða Føroyar.

Men eitt er summarið 2002 og eitt heilt annað er várið 2003!

Sambart blaðgrein í Sosialinum, har megnarróðrarkvinnan, Jannie Dam Jacobsen greiðir frá, at hon nú skal til Scillyoyggjarnar fyri triðju ferð. Men samstundis sigur hon, at allar hinar av manningini, sum vóru við til at smyrja hinar manningarnar av summarið 2002, eru farnar fyri vág og vind, og báturin als ikki er mannaður til komandi summar?

Út frá hesum má eg sum gl. róðramaður undrast!

Genturnar á Jarnbardi, sum vóru tær best kvalifiseraðu til Scillyoyggjarnar aftan á seinasta summar - eru allar uttan Jannie - givnar at rógva?

Og Jarnbardur er ikki mannaður enn, til summarstevnurnar í ár?

Hvør ferð so til Scillyoyggjarnar við Jarnbardi? - Hannis og hinir í róðrarsambandinum kanska?

Hetta ljóðar ikki rætt í mínum oyrum!

Serliga tá eg veit, at manningin á Smyril bert var eitt pláss aftan fyri Jarnbard (Smyril var nr. 2 á Noroyastevnu) og har øll manningin er til taks, umframt at eg veit, at teir longu nú, eru komin væl ávegis í venjingini, til komandi summar.

Undir slíkum umstøðum, skuldi ongin ivi verið um, hvør manning eigur at umboða Føroyar á Scillyoyggjunum í vár!

Sosialurin

Sosialurin
Stovnaður: 1927
Ábyrgdarblaðstjóri: Jan Müller
jan@sosialurin.fo
Blaðstjóri: Eirikur Lindenskov
eirikur@sosialurin.fo
Figgjarleiðari: Jákup Mørk
jakup@sosialurin.fo

Marknaðardeild: lysing@sosialurin.fo
Jonhard Hammer jonhard@sosialurin.fo
Finnbjørg Nattestad
finnbjorg@sosialurin.fo
Durita Simonsen durita@sosialurin.fo

Blaðfólk:
Áki Bertholdsen aki@sosialurin.fo
Eyðun Klakstein eydun@sosialurin.fo
Edvard Joensen edvard@sosialurin.fo
Heri á Rógvi heri@sosialurin.fo
Ingrid Bjarnastein ingrid@sosialurin.fo
Vilmund Jacobsen vilmund@sosialurin.fo
Solby Eliasen solby@sosialurin.fo
Dagfinn Olsen dagfinn@sosialurin.fo
Ingi Rasmussen ingi@sosialurin.fo
Magnus Gunnarsson maggi@sosialurin.fo

Ítróttur:
Jákup Mørk jakup@sosialurin.fo

Myndamenn:
Álvur Haraldsen alvur@sosialurin.fo
Jens Kristian Vang jensk@sosialurin.fo

Sosialurin í Norðoyggjum:
Postmoga 231
Nólsoyar Pálsgøta 1, 700 Klaksvík
tel. 458686 fax 458687
e-post: klaksvik@sosialurin.fo
Sosialurin í Suðuroy:
tel. 375364 fax 375464
tel. 220727
e-post: aki@sosialurin.fo
e-post: dagfinn@sosialurin.fo
Sosialurin í Eysturoy:
Postmoga 143, Saltangará
tel. 447820 fax 449520
tel. 225429
e-post: vilmund@sosialurin.fo
Sosialurin í Vágum:
360 Sandavágur
tel. 333820, 220507 fax 333720
e-post: edvard@sosialurin.fo
e-post: vagar@sosialurin.fo

Uppseting/prent:
Uppseting: Hestprent
Prent: Prentmiðstoðin
Útgevari:
Sp/f Sosialurin
Avgreiðsla:
Mán.-fri. 8-16
Argjavegur 26,
Tel. 311820, Fax 314720
Postadressa:
Postboks 76, 110 Tórshavn
E-mail:
post@sosialurin.fo
lysing@sosialurin.fo
lysingartorg@sosialurin.fo
varp@sosialurin.fo

Blaðið verður prentað
mánadag-fríggjadag klokkan 14[00]

Lýsingar

Freistir:	Tekstlýsingar	Størri lýsingar	Lýsingartorgið	Heilsanir
Týsdagsblaðið	Mán.kl. 10	Frí. kl. 15	Frí. kl. 12	Frí. kl. 12
Mikudagsblaðið	Týs. kl. 10	Mán. kl. 15	Mán. kl. 12	Mán. kl. 12
Hósdagsblaðið	Mik. kl. 10	Týs. kl. 15	Týs. kl. 12	Týs. kl. 12
Fríggjadagsblaðið	Hós. kl. 10	Mik. kl. 15	Mik. kl. 12	Mik. kl. 12
Leygardagsblaðið	Frí. kl. 10	Hós. kl. 15	Hós. kl. 12	Hós. kl. 12

Størri lýsingar, sum nógv arbeiði stendst av, mugu vera inni í góðari tíð og áðrenn ásettu freistir.
Framíhjápláss má umbiðjast í góðari tíð.

Stødd:
Ein heil síða í Sosialinum er 254 mm breið og 346 mm í hædd. Breiddin á einum teigi er 39mm og rúmið millum teigarnar er 4mm.

Innsent tilfar
Fult navn skal vera undir innsendum tilfari. Innsendar greinar, har blaðleiðslan ikki er kunnað um bústað og telefonnummar, verða ikki settar í blaðið.

VIÐMERKINGAR

Skunda sær spakuliga

Leivur Hansen
býráðslimur

Hallur Hjalgrímsson spyr í bløðunum friggjadagin 27. februar, hvørja støðu limirnir í minnilutanum í Tórshavnar býráð hava til ætlaða undirsjóvartunnilin millum Skálafjørðin og Havnina.

Skal í hesum sambandi upplýsa, at spurningurin hvørki hevur verið viðgjørdur í minnilutanum ella býráðnum yvirhøvur.

Mær kunnugt er talan (fyribils) bert um eitt hugskot. Og sambært landsstýrismanninum,ið varðar av hesum málsøki, verða pengar ikki tøkir á figgjarlógini til eina slíka verkætlan í braði.

Hallur og ivaleyst mong við honum stúra av røttum fyri tí ferðsluruðuleika, ein tílíkur tunnil fer at hava við sær í høvuðsstaðarøkinum.

Ringt er jú sum er!

Her eigur og má høvuðsstaðurin sjálvandi fáa stundir til m.a. at takla henda trupulleika, áðrenn landfast verður inn á Skálafjørðin.

Við hesum í huga, havi eg persónliga onki ímóti, at eysturoyingar arbeiða víðari við ætlanini, bara teir skunda sær spakuliga!

Undirsjóvartunnil í Sandoynna

Palli Dalsgaard

Nú fyrsti undirsjóvartunnilin er komin í Føroyum hevur ljóðað, at næsti tunnil verður millum Norðoyggjar og meginlandið, og sum nr. 3 skal verða tunnil til Sandoynna. Men sum ikki einaferð, tá nakað skal henda í Føroyum, so er tað altíð onkur annar, sum skal hava tað sama. Tað sær út sum fólk hava gloymt, at tað er landfast millum báðar tær stóru oyggjarnar. Hóast vit her suðuri hava fingið munandi betri umstøður at ferðast til Havnar, sær tað út sum tað ikki gevur møguleikar til at ung fólk seta seg í búgv aftur her. Hugsi serliga um tær smærru bygdirnar, sum eru fýra í tali. Tann eina er avtoftað og tað sær út sum um hinum trimum bygdunum ikki býður í bøtur, um ikki nakað munagott verður gjørt. Vit liggja so nær Havnini, at var tað koyrandi ímillum, er lítil ivi um, at tað lat seg væl gera at búð her suðuri.

Umstøðurnar at seta búgv her eru av teim allarbestu. Lendið er slætt og víddin stór og tað verður gjørt tað,ið gerast kann, fyri at fáa fólk at trívast. Tað er harmiligt, at bygdir, sum í øldir hava lívbjargað nógvum fólkum, skulu sovna burtur, tí tað er so nógv betri aðrastaðni.

Tað kemur at liggja ein stór ábyrgd á teimum fólkum, sum verða bygdaráðslimir, tá tann tíðin kemur, at tunnil nr. 3 skal borast. Tí tá má eitt krav koma frá Sandoynni, sum fyrnd er í. Tí skulu menn nú við tað sama seta seg niður at tosa um at leggja kommunurnar saman til eina kommunu, tað skuldi verið gjørt fyri árum síðan, men betur seint enn ongantíð. Tað vil vera eitt heilt annað krav,ið kemur frá eini stórari kommunu, enn eitt krav frá fleiri spjaddum, smáum kommunum.

Míni ráð til tykkum eru hesi: Latið tað,ið farið er, fara, síggið stórt uppá tingini og brúkið vit og skil, gerið eina stóra kommunu. Tí tað, sum er størsti meinbogin hjá okkum, eins og hjá suðuroyingum, er fráflytingin. Tey pláss, har lítil og eingin fráflyting er, hava ikki tann meinbogan at stríðast við, sum vit í Sandoynni og suðuroyingar hava.

Javnstøða á øllum økjum!

Sofus Joensen

Havi júst sitið og lisið javnstøðulógina ígjøgnum.

Sigast má, at ikki fyllir hon nógv, bert tvær A4 síður!

Nú leitaði eg eftir, hvar nakað stóð um javnstøðu viðvíkjandi børnum og foreldramyndugleika. Har var einki! Bara um arbeiðsmarknaðarmál! Men tað er jú heldur ikki neyðugt at seta nakað um sovorðið í eina lóg, tí har er jú javnstøða, ha?

Nei tvørturímóti! Har er als eingin javnstøða! Vit pápar fáa 20% av árinum sum mest vanligt minstamark at verða saman við børnum okkara, og kunnu eisini missa rættin, ella søkja um at fáa hann øktan! Skuldi tað verið neyðugt? Skuldi tað ikki verið soleiðis, at okkum ikki nýttist at søkja um at fáa tað økt? Skuldi tað ikki verið soleiðis, at vit í kraft av javnstøðulógini fingu 50%?

Eg tosaði við eina kvinnu sum segði, at um hon kom í ta støðu, at maðurin fekk børnini eftir ein hjúnaskilnað, so bleiv hon svøk!? Hesari støðu hava vit pápar verið í, síðani fyrsti hjúnaskilnaðurin var veruleiki! Og sigið mær eitt! Skulu vit pápar ikki blíva svakir?? Nei, vit skulu bara finna okkum í tí!!

Tá so til barnafrádráttin kemur, ja so fellur hann eisini til tann, sum fær foreldramynduleikan! "Tann" vísir til kvinnuna! Og so aftrat hesum, skulu vit pápar gjalda barnapengar!!

Hevði tað ikki verið eitt hugskot, at broytt lógina soleiðis, at vit pápar fingu 50% av foreldramyndugleikunum, sum verða deildir út (ikki felags foreldramynduleika!), 50% av samverutíðini, 50% av barnafrádráttinum, og so gloymt barnapengarnar? Tí barnapengarnir hava verið, eru og fara altíð at vera ein fløkja og eitt haft um beinini hjá honum,ið skal gjalda!!

Eg meini so við, skal javnstøða verða í øllum málum á arbeiðsmarknaðinum, so skuldi ikki verði annað enn rímuligt, at javnstøða eisini var hesum viðvíkjandi! Tí tað er júst tað, sum javnstøðulógin er: Eitt amboð at deila rættvísi ímillum kynini!!

So er eisini vert at nevna, at varð býtt helvt um helvt, so hevði tað ikki verið heilt so lokkandi, at fari í holt við ein hjúnaskilnað, sum nú er! Kanska eitt evni hjá Miðflokkinum at tikið upp!?

Sjálvandi eru hjúnabond, sum ikki eru til at bjarga, men eg ivist ikki í, at hetta hevði minkað nakað um trupulleikan!

Eisini hevur verið í ÚF, at børn hjá einsamøllum foreldrum verða verri fyri í samfelagnum, og hava eitt hægri sjálvmorðsprosent, enn børn hjá foreldrum,ið liva saman! Og tað eru jú børnini vit hugsa um, ikki so??

Við hesum haldi eg, at vit høvdu sligið fleiri flugur við ein smekk: Javnstøðu á hesum økinum, møguliga færri hjúnaskilnaðir, og síðst, men ikki minst, so hevði landið spart hasar vælsignaðu 6-7 milliónirnar, sum teir hava krøkt seg í!

Annars haldi eg eisini, at tað verða eykajáttanir samtyktar til bæði lík og ólík, so um einki er sett av á figgjarlógini til stuðulin til okkum pápar, skuldi tað slett ikki verið nakar trupulleiki at bara samtykt eina eykajáttan!

STABBI OG TONGUL

(feðgarnir báðir)

lag: Ein gomul kista av kamfertræ

Hetta er kvæðið um hvalin tann,
sum feðgarnir keyptu á sinni,
til skemt og gaman, sum vera man,
bæði hjá manni og kvinnu:
"Hetta her var eitt ordans kubb,
men kvikir, tí longu kvøldar."
Nú var bert eftir at skera upp
og fáa matin til høldar.

Teir høvdu verið í vási fyrr
og kendu til luffur og limir,
bein og bygnað og spik og pirr
og vóru í hondunum fimir.
Brynjaðir standa teir lið um lið,
mála og meta um slagið,
nærkast síðan so við ov við
og leggja so báðir í vaðið.

Tongul stendur og grístar tenn
við brýndum knívi í hendi.
"Eg haldi, at hvalurin livir enn!"
og knívin í bøkslið hann rendi,
turkar sær sveittan og svør ein eið
og stingur av almakt í blástrið:
"So nú mátti hvalurin pínadoyð..."
Men hann noyddist heim eftir plástri.

So verður flensað og skorið upp,
men ein, sum er kønur í kristni,
stillar seg gleivandi hendur í hupp:
"Nú, fáið nú ikki slysni!
Verið varnir, vælsignaðu menn!"
Og mælir á øðrum sinni:
"Setið ei hol á búkin enn,
tí kanska er Jónas har inni!"

Stabbi opnar sín telgimudd,
tá hoyrist ein veldigur brestur.
Tað er sum at hoyra Graham Ruud
og hansara blásiorkestur.
Fer so at skera frá stertinum av
umvavdur í vil og garnar -
men tað var brátt annar armurin svav,
og so fekk hann krampa í tærnar.

Tongul gongur á hvalin upp
og rópar púra forfardur:
"Eg havi leitað við lykt og lupp,
men eg finni ongar bardur!"
Tá heldur Stabbi tað vera nokk,
og hann hevur hug at skamma` hann:
"Heldur seg vera Dorethu Block,
nei tú, bardurnar tær sita framman!"

Tongul leitar sær burturfrá,
man djúpt í huganum grava,
heimi í bygdini steðgar hann á:
"Jú, vístur skal eg bløðruna hava!"
Loypur so út aftur sjógv á bak
og bløðruna slítur úr kvioi -
at blása gjørdist eitt ódnartak,
tí ei hevði hvalurin migið.

Feðgarnir týða til fornan sið,
tí teir skulu vilini draga;
snøggliga fara teir báðir á glið,
so ymislig lagnan er lagað:
Annar lá undir (og hin omaná)
og hevði so snediga stemmu,
undirvørrin var gul og blá,
tí høvdið var komið í klemmu.

Umsíðir liggur alt tvøstið har,
men illa tað gongur at býta;
báðir vilja teir nøra at sær,
teir guva og harka og spýta.
Partar tveir og hálvt annað skinn,
teir rokna og dividera -
tað er sum at spæla "skava og vinn"
og lata tí heldur vera.

Svá eru gávur og evni mans
at krutla og kalkulera;
tí treða teir báðir ein grindadans,
sum grindamenn plaga at gera.
Gloymd er tuggan, teir kvøða hátt,
størri er gleðin enn sorgin -
reypa óført og semjast brátt:
"Vit keypa ein annan í morgin!"

X